umhvørvisstovan

Vestmanna byrsufelag
Hornavegur 8
350 Vestmanna

Argir, hin 09. juli 2010
Málnr.: 10/00365-3
Málsviðgeri: Lena Ziskason

# Umhvørvisgóðkenning

av

# Vestmanna byrsufelag

Henda umhvørvisgóðkenning av Vestmanna byrsufelag, matr. nr. 106$^{a}$ og 314 í Vestmanna, er givin við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, og grein 1, stk. 4 og 4a, í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, seinni broytt í grein 5, nr.1 og 4 í kunngerð nr. 90 frá 28.september 2007 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna.

## 1. Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

## 2. Umsóknin

Umhvørvisstovan fekk hin 16. apríl 2010 umsókn um umhvørvisgóðkenning av skjótivøllinum hjá Vestmanna byrsufelag í Vestmanna.

Ætlanin er at gera ein skeet-skjótivøll. Saman við umsóknini hevur Umhvørvisstovan móttikið tekningar, sum vísa standard innrætting av einum skeet-skjótivølli.

Eisini hevur Umhvørvisstovan móttikið avrit av brævi frá Vestmanna kommunu, har kommunan skrivar:

*Trivnaðar- og umhvørvisnevndin viðgjørdi á fundi tann 17. august 2009 umsókn frá tær og ørðum um lendi til leirdúgvuskjóting – slættin á moldrúgvuni úti á Berg.*

*Nevndin samtykti einmælt at ganga umsóknini á møti, í fyrsta umfari við eini royndartíð upp á 1 ár.*

*Áðrenn ein endalig avtala verður gjørd partanna millum, verður við hesum heitt á tykkym um at koma við eini tekning og frágreiðing um, hvussu tit kundu hugsa tykumm at innrætta økið, og hvussu tit ætla at tryggja, at økið ikki verður dálkað við høglum og leirdúgvupettum.*

Umhvørvisstovan hevur verið og vitja á staðnum og tosa við umboð fyri Vestmanna byrsufelag.

Tað móttikna tilfarið og vitjanin, hevur verið grundarlag undir viðgerðini av umsóknini.

## 3. Lýsing av virkinum

Skjótivøllurin er á matr. nr. 106ª og 314 í Vestmanna. Økið, har ein stendur og skjýtur frá, er partur av matr. nr. 106ª. Leirdúgvurnar verða skotnar niðan ímóti matr. nr. 314. Vestmanna byrsufelag hevur fingið loyvi frá Vestmanna kommunu at brúka nevnda øki sum skjótivøll, fyribils í eitt ár.

Ein ábyrgdarpersónur skal altíð vera til staðar tá skotið verður. Einans høglbyrsur verða nýttar og farast skal væl um, so at umhvørvið órógvast minst møguligt.

Skotið verður eftir leirdúgvum, ið verða kastaðar út við kastimaskinum. Einans skeet. Skotið verður við patrónum við stálhøglum. Talvan niðanfyri vísir eitt yvirlit yvir, hvussu nógv væntandi verður skotið. Um skjótivirksemið økist munandi, skal nýggj umsókn latast Umhvørvisstovuni.

<u>Virksemi, yvirlit</u>

| | Skotfólk | Umfør | Patrónir tal | Stálhøgl nýtt kg | Dúgvur tal | Dúgvur kg |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vanligan dag | 4 | 2-3 | 250 | 6 | 250 | 25 |
| Um summarið (mitt í viku) | 4 | 2-3 | 250 | 6 | 250 | 25 |
| Um summarið (leygardag) | 4 | 2-3 | 250 | 6 | 250 | 25 |
| Kapping (1-2 ferðir um árið) | 14 | 3 | 2100 | 50,4 | 2100 | 210 |

Í einum umfari verður skotið eftir 25 dúgvum við 25 skotum.

Vestmanna byrsufelag hevur upplýst, at skotið verður vanliga allar dagar í vikuni. Harumframt væntar felagið at hava tvær kappingar um árið. Kappingar eru vanliga leygardagar.

Netskermar skulu setast upp á økinum, áðrenn skjótingin byrjar, fyri at lætta um uppruddingina av leivdum av leirdúgvum. Felagið ruddar patrónhylki, patrónproppar, leirdúgvuleivdir o.a. burturkast upp eftir hvørja skjóting.

Ætlanin er at gera tveir skúrar á økinum. Teir verða brúktir at skjóta leirdúgvurnar úr, umframt til goymslu av ymsum slagi.

## 4. Viðgerð

Í nógv ár hevur verið skotið við blýggjhøglum og leirdúgvum, ið innihalda tjøru. Hetta hevur havt við sær ein dálkingarvanda av økinum, serliga orsakað av blýggjhøglum. Kanningar aðrastaðir vísa, at helvtartíðin fyri niðurbróting av blýggjhøglum er umleið 40-70 ár, onkuntíð styttri.

Blýggjhøglini hópast upp í ovara moldlagnum, og verður blýggj frígivið frá høglinum eftir eini tíð. Ein partur av tí metalliska blýnum er tá gjørt um til lætt loysilig blýggjsølt, sum kunnu upptakast av plantum og djórum. Við at hyggja eftir talvuni undir pkt. 3 ber skjótt til at gera sær eina mynd av, hvussu stórar nøgdir av blýggi kunnu væntast at vera á økinum.
Bann verður sett ímóti at skjóta við blýggjhøglum á økinum, og skal felagið eisini nýta tær mest umhvørvisvinarligu leirdúgvurnar og patrónirnar, sum fáast á marknaðinum.
Viðvíkjandi ampum frá óljóði, verður treyt sett um, at felagið altíð miðar ímóti at brúka tær mest ljóðveiku patrónirnar.

Umhvørvisstovan hevur haraftrat sett treyt fyri, at onki burturkast ella annað árin frá skjótivirkseminum má enda í fjøru ella á sjógvi. Tískil má felagið leggja skjótingina so til rættis, at hvørki leirdúgvur, patrónhylki, patrónproppar ella stálhøgl kunnu enda í fjøru ella á sjógvi.

Uppskot til umhvørvisgóðkenning var tann 7. mai 2010 sent Vestmanna byrsufelag, Vestmanna kommunu og friðingarnevndina fyri Streymoyar sýslu til viðmerkingar.

Ongin hevði nakra viðmerking.

## 5. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum. Harumframt eru **góðkenningartreytirnar í fylgiskjali 1** galdandi.

Um samsvar ikki er millum treytirnar niðanfyri og treytirnar í fylgiskjali 1, eru treytirnar niðanfyri galdandi.

***Góðkenningartreytir:***

1. Ikki er loyvt at skjóta við blýggjhøglum. Skjótast kann við stálhøglum. Harumframt skal felagið altíð miða eftir at brúka tær mest framkomnu patrónirnar á marknaðinum, eisini tá ið hugsað verður um óljóðsstøði.
2. Tær til eina og hvørja tíð mest umhvørvisvinarligu dúgvurnar skulu nýtast. Í løtuni er tað kálkdúgvur.
3. Økið skal innrættast so, at onki burturkast ella annað í sambandi við skjótivirksemið endar í fjøru ella á sjógvi. At forða fyri at leirdúgvubrot enda uttanfyri øki skulu netskermar vera báðu meðni.
4. Økið má ikki nýtast til annað virksemi enn skjótibana, fyrr enn kanningar, ið Vestmanna byrsulefag hevur ábyrgd av, vísa, at økið ikki er dálkað. Umhvørvisstovan skal góðkenna og meta um úrslitini av kanningini.
5. Alt økið, ið er og verður merkt av skjótivirkseminum, skal verða avmerkt, áðrenn skjóting kann loyvast, so at ongin ivi er um, hvat øki er fevnt av hesi umhvørvisgóðkenning.
6. Skelti, ið vísir, hvar og nær skotið verður, umframt víddina av økinum, skal verða týðiligt fyri ein og hvønn vitjandi á økinum.
7. Patrónhylki, patrónproppar, leirdúgvuleivdir o.a. burturkast skal savnast upp aftaná hvørja skjóting og handfarast sambært treytum í kapittul 6 í fylgiskjali 1.
8. Tá skotið verður, skal ein ábyrgdarpersónur altíð verða til staðar, sum tryggjar at treytirnar í umhvørvisgóðkenningin verða hildnar. Nevndin í felagnum kann velja ábyrgdarpersónar.
9. Skrásetingar skulu gerast yvir hvønn dag skotið verður. Skrásetast skal: dagur, byrjan og endi á skjóting (klokkan), umframt hvør er ábyrgdarpersónur fyri at treytirnar í umhvørvisgóðkenningini tann dagin verða hildnar. Tal av patrónum og leirdúgvum skulu skrásetast. Rudding skal skrásetast.
10. Skrásetingarnar, nevndar í treyt 9) omanfyri og í kapittul 9 í fylgiskjali 1, skulu sendast Umhvørvisstovuni eftir umbøn.
11. Vestmanna byrsufelag skal boða Umhvørvisstovuni frá, um aktiviteturin økist munandi (sí kapittul 10, fylgiskjal 1).

**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

## 6. Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008 kærast til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuna, sum síðan sendir hana til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Jóhanna Olsen, deildarleiðari

Lena Ziskason, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Vestmanna kommuna, Bakkavegur 16, Postboks 91, FO-355 Vestmanna

Friðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu, att.: Finnbogi Midjord sýslumaður,
Jónas Broncksgøta 17, Postboks 3018, FO-110 Tórshavn

Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn

**Hjálagt:** Fylgiskjal 1.

# Fylgiskjal 1

## Góðkennningartreytir

### 1 Innrætting og rakstur

1.1 Virkið skal rekast soleiðis, at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.

1.2 Øki, sum hoyra til virkið, skulu verða týðiliga avmerkt.

1.3 Virkið skal halda øll útlát so lág sum gjørligt. Miðast skal eftir at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]), og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar.

1.4 Miðast skal eftir at nýta evni og tilfar, ið hava minst møguligt árin á umhvørvið.

1.5 Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

### 2 Goymslur

2.1 Evni og tilfar, ið kunnu dálka, skulu goymast soleiðis, at einki útlát til umhvørvið kann fara fram. Goymslur skulu innrættast soleiðis, at møguligir lekar og spill kunnu haldast aftur.

2.2 Evni, ið eru á goymslu uttandura, skulu vera í íløtum, sum eru góðkend til uttandura goymslu av viðkomandi evni.

### 3 Óljóð, ristingar og ljós

3.1 Óljóð[2] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

**Talva 1:** Markvirði fyri óljóð - dB(A)

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán – frí | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Ley | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán – frí | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Ley | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgidagar | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

3.2 Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirði) í bústaðarøkjum (øki 3 og 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði.

3.3 Virksemið skal ikki hava við sær ampar av óljóði, íroknað lág- ella háfrekventum óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum. Um ampar verða av hesum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

### 4 Útleiðing til luft

4.1 Virksemi má ikki hava við sær ampar av royki, lukti ella dusti uttan fyri øki virkisins.

4.2 Allar útleiðingar til luft skulu førast uppeftir.

4.3 Um ampar verða av royki, lukti, dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

[1] Best Available Techniques.
[2] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

## 5 Spillivatn

5.1 Alt spillivatn skal leiðast í kommunalu spillivatnsleiðingina

5.2 Eru dálkandi evni í spillivatninum, skal ein hóskandi reinsiskipan nýtast, so sum olju- ella feittskiljari.

5.3 Reinsiskipanir til spillivatn skulu reinsast og røkjast soleiðis, at tær altíð virka til fulnar.

5.4 Tað skal vera gjørligt at taka sýni av reinsaða spillivatninum.

5.5 Spillvatnið skal yvirhalda markvirðini í talvu 2.

**Talva 2:** Markvirði fyri spillivatn

| Evni | Markvirði | Kanningarháttur |
|---|---|---|
| Olja (mineral) | Max. 10 mg/l | DS/R 208 |
| Olja/feitt | Max. 50 mg/l | DS/R 208 |
| Botnfelliligt evni | Max. 10 ml/l | DS 233 |
| Suspenderað evni | Max. 300 mg/l | DS 207 |
| pH | 6 - 9 | |

## 6 Burturkast

6.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[3].

6.2 Burturkast skal goymast soleiðis, at tað ikki er til ampa.

6.3 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og skal skiljast sambært ásetingum móttakarans.

## 7 Óhapp

7.1 Har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

7.2 Virkið skal hava mannagongdir til fyribyrging av dálkingaróhappum og til upprudding eftir møgulig óhapp.

7.3 Virkið skal, um neyðugt, hava útgerð til upprudding eftir møgulig dálkingaróhapp.

7.4 Henda dálkingaróhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding.

7.5 Størri útlát ella dálking skal beinanvegin fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Umhvørvisstovuni[4].

## 8 Innaneftirlit

8.1 Virkið skal altíð tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

8.2 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið skjalprógvar, at treytirnar í 3. parti, um óljóð, ristingar og ljós, í 4. parti, um útleiðing til luft, og í 5. parti, um spillivatn, verða hildnar.

8.3 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

[3] Kunngerð nr. 147 frá 19-10-1995, um burturkast, og kunngerð nr. 40 frá 09-04-1992, um lívrunnið burturkast frá alivinnuni, seinni broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

[4] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

8.4 Sýnistøkur og kanningar skulu gerast av persóni ella felag, sum Umhvørvisstovan kann góðtaka.

8.5 Sýnistøkur og kanningar skulu gjaldast av virkinum.

## 9 Rakstrarskráseting

9.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nøgd og slag av rávørum og kemikalium. Databløð fyri øll kemikaliu skulu verða tøk.
- El- og oljunýtsla.
- Avhendaðar nøgdir av burturkasti við tilskilan av slagi og móttakara.
- Røkt av reinsiskipanum.
- Óhapp, sum hava havt útlát ella vanda fyri útláti við sær.
- Úrslit og eygleiðingar (checklistar) í sambandi við innaneftirlit.

9.2 Skrásetingarnar skulu goymast í minsta lagi í 5 ár, og teir skulu vera til taks hjá Umhvørvisstovuni.

9.3 Virkið skal eftir umbøn frá Umhvørvisstovuni senda inn rakstrarskrásetingar, úrslit av mátingum o.a. í hóskandi uppseting.

9.4 Umhvørvisstovan kann krevja aðrar skrásetingar enn tær, ið eru nevndar undir 9.1

## 10 Almennar treytir

10.1 Boðast skal Umhvørvisstovuni frá, tá ið farið verður undir virksemið.

10.2 Gongur meiri enn eitt ár, áðrenn farið er undir ætlanina, fellur umhvørvisgóðkenningin burtur.

10.3 Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir dálkingina, uttan nýggj góðkenning er givin.

10.4 Góðkenningin skal altíð vera tøk á virkinum. Øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið í góðkenningini og vita, hvar góðkenningin er til taks.

10.5 Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni.

10.6 Umhvørvisstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

10.7 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu nýggjar treytir bert ásetast, um so er, at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig árin, ið ikki vóru kend, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

10.8 Aftan á fimm ár kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi góðkenning, tá ið tað er umhvørvisliga grundað.

10.9 Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við øðrum góðkenningum.